Klaksvíkar Sjómansskúli:

Tríggjar útbúgvingar

Klaksvíkar Sjómansskúli kann nú bjóða fólki tríggjar ymiskar útbúgvingar

Klaksvíkar Sjómansskúli er í løtuni »breiðasti« sjómansskúlin í landinum. Tríggir útbúgvingarmøguleikar eru á skúlanum. Heimaskipara/skiparaútbúgving, skipskokkaútbúgving og nú tann nýggjasta útbúgvingin í Føroyum, sjóvinnuútbúgving.

Frants Jacobsen, sjómansskúlastjóri, kann nú bjóða áhugaðum tríggjar ymiskar útbúgvingar *Mynd: Diml./Grækaris*

Skipskokkur

Einasta skipskokkaútbúgving í landinum er í Klaksvík. Hetta má tó metast sum eitt slag av grundútbúgving.

Næmingarnir læra at gera góðan skipsmat - ikki hotelmat. Tað verður eisini undirvíst í proviantering, sjómansskapi, fiskivinnu, rokning og enskum o.s.fr.

Endamálið við útbúgvingini er, at næmingur eftir loknað útbúgving, kann gera mat til eina skipsmanning uppá einar 30-40 manns.

Lærutíðin er uml. 6 mðr., og endar við próvtøku.

Sjóvinnuútbúgving

Sum vit longu hava nevnt, so er nýggjasta útbúgvingin í Føroyum sokallaða sjóvinnuútbúgvingin.

Hetta er eisini ein 5-6 mðr. útbúgving, og er ætlað øllum, ið skulu útbúgvað seg innan siglingarfrøði/navigatión.

Og tey sum ikki vita hvørt sjóvinnuskúlin verður góðskrivaður siglingartíðini ella ikki, nýtast ikki at ivast longur. Frants Jacobsen, sjómansskúlastjóri sigur, at sjóvinnuskúlin verður góðskrivaður 100%. Og í onkrum føri verða meira enn teir 5-6 mánaðirnir góðskrivaðir.

Breið útbúgving

Sjóvinnuútbúgvingin er rættuliga breið. Lærugreinarnar eru m.a.: Siglingarfrøði/navigatión, sjómansskapur, sjóreglar, trygd á sjónum, arbeiðstrygd, fiskivinna og fiskiamboð, eldsløkking og roykkaving, viðlíkahald, reingerð, amboðslæra og motorlæra, 1. hjálp, svimjing og fimleikur o.l.

Ætlanin er, at hava eitt ávíst samarbeiði við Tekniska skúla um nakrar lærugreinar. Næmingarnir koma eisini møguliga at búgva á Tekniska skúla.

PRIDE

Frants Jacobsen sigur, at hann hevur havt fyrispurning á Strandferðsluni um møguleikar fyri, at sjóvinnuskúlanæmingarnir kunnu halda PRIDE við líka.

– Og líkt er til, at hetta verður í lagi, sigur hann.

Frants Jacobsen sigur, at í Danmark er stórt trot á t.d. aspirantum, og eitt av krøvunum fyri at gerast aspirantur er júst sjóvinnuútbúgving.

– So alt talar fyri, at sjóvinnunæmingarnir hava eina ljósa framtíð, sigur hann.

Heimaskipari/skipari

Heimaskiparaútbúgvingin er ein partur av skiparaútbúgvingini, og tekur eitt ár.

Ein heimaskipari kann føra fiskiskip upp til 800 br.reg.t. út til 30 fjórðingar, fiskiskip upp til 500 br.reg.t. út til 200 fjórðingar, og verða stýrimaður á fiskiskipum í altjóða sjógvi.

Tekur næmingur eitt hálvt ár afturat heimaskipra útbúgvingini, verður hann skipari.

Ein skipari kann føra fiskiskip upp til 1600 br.reg.t. út til 200 fjórðingar, og fiskiskip upp til 800 br.reg.t. í altjóða sjógvi. Hetta seinasta er eisini galdandi fyri farma/handilsskip.

Seks lærarar

Í løtuni starvast seks lærarar og eitt skrivstovufólk á Klaksvíkar Sjómansskúla. Afturat hesum koma møguligar lærarakreftir á Tekniska skúla.

48 næmingar verða á skúlanum eftir summarfrítíðina, 24 skiparanæmingar, 12 sjóvinnunæmingar og 14 skipskokkanæmingar.

Gdm-

Sovjet vil med i international valutafond

Washington (RB-Reuter) Sovjet har søgt om at blive optaget som fuldt medlem af den internationale valutafond, IMF, oplyste kilder i IMF tirsdag.

Ansøgningen er det seneste skridt i de sovjetiske bestræbelser på at gøre en ende på landets mangeårige, selvvalgte isolation fra det internationale, økonomiske system.

IMF-kilderne udtrykte overraskelse over den sovjetiske ansøgning, fordi de førende vestlige industrilande i sidste uge tilbød præsident Mikhail Gorbatjov en øjeblikkelig sovjetisk særstatus i IMF og Verdensbanken. Det vil gøre de muligt for de to institutioners eksperter at rådgive Sovjet i den planlagte omstilling til en markedsøkonomi.

Fuldt medlemskab vil åbne for lån til omstillingen, men forhandlingerne om at optage Sovjet vil tage flere år.

EF søger at standse jugoslavisk krig

BEOGRAD (RB-AFP) Altimens kampe mellem serbere og kroater fortsætter med at koste dræbte i den jugoslaviske republik Kroatien, optrapper EF sine bestræbelser på at bringe den etniske og politiske krise i Jugoslavien til ophør.

Jugoslaviens ministerpræsident Ante Markovic og hans udenrigsminister Budimir Loncar, er blevet inviteret til samtaler i EF's hovedkvarter i Bruxelles næste mandag, oplyser det jugoslaviske nyhedsburau Tanjug.

Beslutningen om at invitere Markovic og Loncar er taget af EF's politiske samarbejdskomité, der er ved at forberede det næste møde mellem EF-landenes udenrigsministre.

Ligeledes tirsdag meddelte EF, at man overvejer at lade de EF-observatører, der befinder sig i Slovenien rejse ind i naborepublikken Kroatien, hvor etniske sammenstød har kostet mindst 22 mennesker livet siden mandag.

Beslutningen om eventuelt at udvide EF-observatørernes mandat til også at omfatte en »substantiel mission« til Kroatien vil blive taget, når Bruxelles en af de kommende dage modtager en rapport fra EF's særlige udsending i Jugoslavien, der hollandske ambassadør Henri Wijnaendts, skriver Tanjug.

Góðir bilførarar fáa herðaklapp

Fáa bandið »Stýr tær« og vera við í lutakastinum um tríggjar fyrstuhjálparskjáttur

Bilførarar á føroysku vegunum fara nú at fáa eina viðurkenning frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd um teir lúka treytirnar fyri tryggan og rættan atburð í ferðsluni. Hetta er ein liður í royndunum at gera føroyskar bilførarar meira umhugsnar í ferðsluni.

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur heitt á politiið um at finna teir góðu bilførararnir í Føroyum. Hvør politistøð í landinum hevur fingið sendandi 10 heilsanarkort og 10 eintøk av bandinum »Stýr tær«, ið skulu latast sum viðurkenning fyri góðan atburð í ferðsluni. Politiið avger so undir regluligu ferðslukanningunum, hvør ið verdur er eina virðisløn. Farið verður kortini ikki at kanna fleiri bilar orsakað av tiltakinum.

Krøv

At vera góður bilførari er ikki bara at liggja undir 80 km/t á Oyggjarvegnum og at hava ljósini í lagi. Ein góður bilførari hevur koyrikortið uppi á sær, situr í teygdarbelti og hevur í øllum førum ikki smábørn á setrinum framman. Bilurin skal sjálvandi vera í lagi allur sum hann er. Tann sum ikki líkur hesar treytir, hevur ikki viðurkenning uppiborna.

Teir góðu bilførararnir kunnu, um teir ynskja tað, lata seg skráseta hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd og í heyst vera við í lutakastinum um 3 fyrstuhjálparskjáttur.

óz

Situr førarin ella nakar annar í bilinum uttan trygdarbelti ella koyrikortið liggur í skuffuni heima, kann hann ikki rokna við at fáa virðisløn fyri góðan atburð í ferðsluni. Her krevst, at alt er í lagi. *Mynd: Hilmar Jan Hansen*

Berlin Rock Palace

Dansihølini í Havnar Klubba eru umvæld og hava aftur skift navn

Fyrst Klubbin, so Hølið, so Tiffany, so Diskotek 5-arin og nú Berlin Rock Palace. Ja, hetta er nýggjasta heitið á dansihølunum í Havnar Klubba, ið nú aftur eru vorðin umvæld.

Ljóðanleggið hevur fingið eina yvirháling. Gólvið er pussað og smurt. Ljósanleggið er munandi útbygt og fylgisveina-sjónvarpsútgerð er fingin til vega. Videoskermur er hongdur upp í hølinum og plátuvendarin kann við nýggju útgerðini fanga bæði MTV og Lifestyle rásirnar og senda tær beinleiðis ígjøgnum anleggið í stereo. Eisini fara plátuvendararnir í framtíðini at spæla videoløg undir dansinum.

Í kjallarahæddini er gjørd ein cafe, sum er ætlað teimum, ið dáma harðan rock og har verður eisini møguleiki at keypa sær okkurt fyri svongd og tosta. Fólk kunnu eisini dansa í kjallarahæddini.

Berlin Rock Palace letur upp alment í annaðkvøld kl. 22.00 og um ólavsøkuna verður opið hvørt kvøld til og við týskvøldinum 30. juli. Heðin Arge Jensen verður ein av plátuvendarunum um ólavsøkuna. Miss Sheila kemur eisini at vísa kynstur síni við eldi, dansi og slíkum. Miss Sheila verður á pallinum øll kvøldini undantikið týskvøldið.

Berlin Rock Palace verður hereftir opið hvørt fríggjakvøld og aldursmarkið verður 16 ár.

Stór framsýning í Aberdeen um olju

Flogferð verður úr Føroyum til framsýningina

Í døgunum frá 3. til 6. september í ár verður stór framsýning í Aberdeen í Skotlandi um oljuvinnu. Framsýningin hevur heitið »Offshore Europe 91«, og møguleiki verður eisini hjá føroyingum at fara á framsýningina, tí skipað verður fyri ferð úr Føroyum við flogfari, og verður steðgurin alla vikuna, sum framsýningin varir.

Tað eru ráðgevarafelagið Faroe Offshore og ferðaskrivstovan Faroe Travel, sum skipa fyri ferðini til Skotlands í sambandi við hesa stóru og áhugaverdu framsýning.

Framsýningin hevur uml. 1500 básar og umfatar alt, ið hugsast kann innan oljuvinnuna. Høvi verður eisini at síggja oljuútbúnað í gongd og pall í gerð, siga fyrireikararnir av ferðini.

Farið verður úr Føroyum við leiguflogfari beinleiðis til Aberdeen sunnudagin 1. september, og heimaftur verður flogið leygardagin 7. september.

Upplýsingar um kostnað (har umframt flogferðina er íroknað innivist á einkultkamari í universitetsíbúð) og annað viðvíkjandi framsýningarferðini fáast at vita við at venda sær til Danny Poulsen á Faroe Offshore í Søldarfirði, sum hevur tlf. 41967 og telefax 42088.

Ferðin er treytað av, at nóg nógv tekna seg, og tekningarfreistina hava fyrireikararnir sett til mánadagin 5. august. ▲

Allans Road Show:

Aftur at hoyra á Ólavsøku

Tey síðstu árini hevur tað næstan verið »traditión«, at Allans Road Show kemur til Føroyar á Ólavsøku, og so er eisini í ár

Allans Road Show úr Danmark hevur tær seinastu Ólavsøkurnar verið afturvendandi gestur við sínum ljóð og ljós showi, og so verður eisini í ár.

Allans Road Show er eitt mobilt diskotek, sum hevur 12 ár á baki. Teir eru nógv eftirspurdir á Sælandi.

Í kappingum fyri mobil diskotek hava teir fingið góð úrslit. Í 1981 gjørdust teir danmarksmeistarar, og gjørdust nr. tvey í 1983 og 1985.

Dagligi leiðarin hjá diskotekinum er Allan Dahlin, sum tey seinnu árini hevur brúkt tað mesta av sínari frítíð at uppbyggja diskotekið, sum í dag hevur roykbumbur, 100 tummar sjónvarpsskerm, umframt ljóð og ljós í langar banar.

Fimm mans við til Føroyar

Á framførsluni á Ólavsøku verða fimm mans við. Allan Dahlin verður ein av plátuvendarunum. Hann hevur 7 tey síðstu árini verið 20 ferðir í Føroyum bæði við Allans Road Show og einsamallur sum plátuvendari.

Henrik Posborg er við í Føroyum fyri 2. ferð. Hann er tann sum skal leggja videoløgini á.

Flemming Dahlin er vanliga ljósmaður, men í ár er tað hann sum skal syrgja fyri laserljósunum, og gera hesa framførslu saman við Allan Dahlin. Hvørt kvøld verða tvey lasershow sum hvør eru fimm min. long.

Hendrik Andersen er við í Føroyum fyri 4. ferð. Allar 4. ferðirnar hevur hann verið í Føroyum í sambandi við Ólavsøkuna. Hann er ljósmaður og skal syrgja fyri fýrverkinum og roykbumbunum.

Niels Sørensen er við fyri 3. ferð. Fyrstu ferð hann var í Føroyum var fyri fimm árum síðani, tá hann var við Allans Road Show á turne í Føroyum. Hann tekur sær bæði av ljósi og ljóðinum.

Allans Road Show ætlar í ár at bjóða føroyingum eitt størri show við meira ljósi og effektum. Hetta skal m.a. gerast við lasarum, so føroyingar kunnu gleða seg til lasershow í heimsklassa.

Tað er fimleikafelagið Ljósi, sum skipar fyri dansinum hjá Allans Road Show á Ólavsøku.

Frá í kvøld til mánakvøldið verður Allans Road Show at hoyra. Frá kl. 19 til 22 verður diskotek fyri børn, og frá kl. 22 verður diskotek fyri vaksin.

klh

Allans Road Show

Jordskælv i Peru

LIMA (RB-AFP) Mindst ti personer blev dræbt og 30 såret ved et jordskælv, der tirsdag ramte tre byer nær Sabancaya-vulkanen i Arequipa-distriktet i Peru.

Jordskælvet, der blev målt til fire på Richter-skalaen, forårsagede omfattende skader i de tre byer, oplyser lederen af det peruanske civilforsvar, general Manuel Pancorvo.